## Tøkk

Øllum teimum, sum á ymiskan hátt gjørdu dagin, tá eg legði frá mær sum kirkjutænari 29. juni 2003 so hugnaligan, fyrst í kirkjuni og síðan í bygdarhúsinum, takki eg hjartaliga.

Somuleiðis takki eg øllum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum 1. juli 2003.

*Heilsan*
**Erhard Johansen,**
**Strendur**

## Tøkk



Øllum tykkum, sum gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum tann 26. apríl, takka vit hjartaliga.

– Tøkk til tykkum, sum gleddu okkum við talu, sangi og spæli
– Tøkk til tykkum, sum komu at gleðast saman við okkum
– Tøkk fyri gávur, blómur og fjarrit
– Tøkk til tykkum, sum stóðu fyri matinum
– Tøkk til tykkum, sum bakaðu, og tykkum, sum hjálptu við at fyrireika alt og prýða
– Tøkk til tykkum, sum tóku myndir, og tykkum, sum stóðu fyri.

Hjartaliga takk øll somul fyri ein ógloymandi dag og Harrin signi tykkum øll

**Annikka og Poul Færø**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara høgt elskaði

**Jarl Heinesen**
**Porkeri**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum talaðu í kapellinum, í kirkjuni og á grøvini. Tøkk til berarar, sangarar og gravarar. Tøkk til tykkum, sum bakaðu og á annan hátt hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur og kransar. Tøkk til tykkum, sum vóru um hann til tað seinasta. Ein hjartans tøkk til tykkum, ið vóru so góð við Jarl. Og tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**

# Atlantic Petroleum í bretskar leitingar

**Tíðindafundur var hildin í Nólsoyarstovu í Havn, har nevndin og stjórnin í Atlantic Petroleum greiddi frá um umfatandi víðkanina av virksemi sínum**

OLJUVINNA
*Rógvi Borðoy*



*Nevndarlimirnir í Atlantic Petroleum, sum í vikuni hava gjørt avtalu um keyp av ognarpørtum í bretskum leitiøkjum*
*Mynd: Jens K. Vang*

P/F Atlantic Petroleum hevur gjørt avtalum við bretska oljufelagið Premier Oil PLC um keyp av ognarpørtum í bretskum oljufeltum. Kostnaðurin av avtaluni nærkast 100 milliónum krónum, og Premier Oil PLC hevur sostatt selt allan sín part í økjunum.

Keypið fevnir um fýra loyvispartar, Robroy/Ivanhoe/Hamish, Chestnut, Perth og Ettrick, sum allir liggja í Norðsjónum. Størsti parturin, sum felagið eigur, er í Chestnut feltinum. Har eigur P/F Atlantic Petroleum 15 prosent, og í tíðindaskrivinum frá felagnum stendur, at roynd-arframleiðsla í 2001 gav sera góð úrslit.

Premier Oil PLC hava tryggjað sær afturkeypsrætt av 5,5 prosentum av økjunum, um munandi nøgdir av olju verða funnar í økjunum. Afturkeypsrætturin er tó ikki galdandi í Ettrick feltinum.

Avtalan bleiv undirskrivað í London í vikuni av nevnd og leiðslu í felagnum. Hetta er seinna keypið hjá felagnum í bretskum øki, eftir at tað keypti seg inn í tvey leitiloyvi vestan fyri Hetland í 2001. Harumframt eigur Atlantic Petroleum part í einum leitiloyvi í føroyskum øki, har fundið Marjun varð kunngjørt í november 2001.

### Tvey aftrat

Wilhelm Petersen, stjóri í P/F Atlantic Petroleum, sigur, at ætlanin er at keypa tvey øki aftrat í bretskum øki, men at tær avtalurnar ikki eru komnar uppá pláss enn. Hann sigur eisini, at tær avtalurnar skuldu verið klárar seinni í heyst.

Í tíðindaskrivi frá P/F Atlantic Petroleum sigur Wilhelm Petersen, at:

- Hetta er sanniliga ein søgulig hending fyri Atlantic Petroleum og øll tey, ið eiga felagið. Felagið, ið byrjaði sum eitt lítið óroynt felag í Føroyum, er vorðið eitt veruligt oljufelag við aktivitetum í Onglandi og Føroyum, har aktiviteturin í Onglandi er hin mest týðandi fyri felagið. Sjálvur kann eg fegnast um, at fyrstu settu málini eru við at verða rokkin.

### Stórar óvissur

Stjórin sigur, at keypið er gjørt við realistiskum metingum. Við í kanningini hava verið serfrøðingar av mongum slagi, sum allir hava góðkent avtaluna. Búskaparfrøðingar, løgfrøðingar og serfrøðingar á skattatekniska økinum hava allir verið uppii.

Samstundis sigur Wilhelm Petersen, at stórar óvissur valda í oljuvinnuni. Tann størsta av teimum eru oljuprísirnir. Til hetta sigur hann, at teir ikki hava gjørt útrokningar við einum miðalprísi áljóðandi 28$ ella nakað líknandi. Felagið hevur gjørt sínar metingar út frá munandi lægri prísum, men akkurát hvør minstiprísurin er, vil felagið ikki út við.

### Eitt rættiligt oljufelag

Stjórin í P/F Atlantic Petroleum, Wilhelm Petersen, sigur, at ætlanin hjá felagnum er at vera við í øllum pørtum av oljuvinnuni. Leiting eftir olju, menning av oljufeltum og oljuframleiðslu. Og við hesari avtaluni sigur stjórin, at felagið er komið eitt sindur nærri málinum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Anker Petersen**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri gávur til barnalegurnar í Nuuk og tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina.

*Fyri tey avvarðandi*
**Rosa, Brestir, Sólgerð og Eyðbritt**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, pápi, fosturpápi, verpápi og abbi okkara

**Gullbrand Simonsen,**
**Sandi**

doyði og fór til gravar.

*Familjunnar vegna*
**Maja**


